


www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 06 - 2013

# Skansi Offshore yvirtikið Kongsborg

Í gjár varð nýggjasta skipið í Skansi Offshore flotanum yvirtikið av reiðaríinum. Skipið er farið av skipasmiðjuni til Stavanger, har tað verður skipsdópur leygardagin. Við til hátíðarhaldið verða umboð fyri reiðarí, føroyskar myndugleikar, vinnulív og onnur. Kongsborg, sum er fimta skipið hjá Skansi Offshore, er av slagnum Havyard 833 og er smíðað á Havyard skipasmiðjuni í Sogn. Skipið, sum kostar umleið 330 mio., hevur sáttmála við oljufelagið BG. Við hesi avtaluni hava øll frálandaskipini hjá Skansi sáttmálar við oljufeløg.
Myndir: Skansi Offshore